# - Ein stórur dagur fyri Grønland

*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*

Eftir framførsluna var móttøka við tónleiki, røðum og onkrum leskiligum afturvið. Grønlendskir politikarar og umboð fyri NAPA umrøddu hesa frumframførsluna, sum eina stórhending í grønlendskari mentanarsøgu og sum ein stóran dag fyri Grønland. Stjórin í Operahúsinum, Michael Christensen, umrøddi framførsluna sum ein fyrsta mentanarstevna millum grønlendskt og danskt í Keypmannahavn.

- Við hesum leikinum hava tey leikandi og onnur ført stóra Grønland til lítla Danmark.

Nukaaka Motzfeldt er fyrsti grønlendski yrkisleikarin. Hetta er innan sjónleik. Pápi hennara Josef Motzfeldt, sum eisini er grønlendskur fíggjarmálaráðharri segði nøkur orð, m.a. gav hann okkum sína útgávu av, hvat mentan er fyri nakað í mun til tað politiska. Í politikki hittir ein ofta eina arrogansu, sum ein persónliga ikki kann brúka til so nógv. Harímóti snýr hugtakið mentan seg um at varðveita forvitnið fyri okkara umhvørvi og hetta hevur stóran týdning fyri okkum øll. Hendan útgávan av mentan hjá Josef Motzfeldt hóskaði seg væl til eina listarliga uppliving sum Polaroid gav. At enda minti hann á, at

# Fyri teimum kongaligu í Kongaliga



Hesar leggir - og svenskan, nostalgiskan radiomusikk einastaðni úr 60-70unum (sungnan av Lill Lindfors), ið fyllti rúmið - skuldi áskoðarin fyrihalda seg til longu frammanundan, at leikurin (soleiðis av álvara) var byrjaður

**Grønlendski leikurin "Polaroid, What´s really going on Around the Northpole?" við føroyska yrkisdansaranum Kristinu Ougaard Sørensen hevði leygarkvøldið danska frumframførslu í Kongaliga Operahúsinum í Keypmannahavn. Saman við grønlendskum politikarum og ummælarum frá størri donskum bløðum, vóru Margreta drotning og Heindrikur prinsur vóru millum áskoðararnar**

LEIKLIST

*Myndir: Nina A. Arge*
*Orð: Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*

Polaroid skrivaði ein nýggjan kapittul í danskari - og ikki at gloyma grønlendskari - leiklistasøgu, tá ið grønlendski leikurin varð frumframførdur í Kongaliga Operahúsinum. Hetta var nevniliga fyrsta grønlendska framførslan nakrantíð á einum av pallunum hjá tí danska Kongaliga Leikhúsinum. Hetta var m. a. markerað við eini kongaligari hjáveru við frumframførsluna á tí minna pallinum í stásiliga Operahúsinum á Hólmanum, í hjartanum á høvuðsstaðnum í danska Kongaríkinum.

Í tí snøgga bóklinginum, sum m. a. sigur frá íkomuni av leikinum Polaroid, What´s really going Around the Northpole, sigur stjórin í NAPA, grønlendska norðurlandahúsinum í Grønlandi, at leikurin er ein roynd at skapa eitt nútímans grønlandskt/føroyskt dansi- og leikúttryk við støði í grønlendskum fortreytum. Afturat hesum hava fyrireikararnir í hyggju at skunda undir eina heilt nýggja listagrein sum ikki finst í Grønlandi - við dansi, leiki, ljósi, ljóði, palllist og leikbúnum.

Norski viðurkendi leikstjórin Jo Strømgren er listarligi leiðarin á Polaroid og hevur NAPA útvalt hann. Í bóklinginum sigur Strømgren, at í leikinum verður arktiski livihátturin kannaður nærri. Spurningar um hvussu fólk fylgja við í tí, sum fyrifferst í samfelagnum, og um hvussu fólk deila og samanbera frásagnir, hava verið íblástrarkeldur. Men, hvat hendir so umkring Norðurpólin ella hvat snýr seg umkring Norðurpólin?



*Kristina Ougaard Sørensen var føroyski parturin av leikinum og einasti yrkisdansarin*

*Mynd: Nina A. Arge*

**Føroyskt, grønlendskt, danskt og teknmál í Kongaliga Operahúsinum**

Eftir at hava reist seg og víst kongshjúninum virðing, settust allir teir 180 áskoðararnir seg væl til rættis. Og leikurin kundi fara í gongd - men, á ein hátt var tað trupult at siga júst nær leikurin byrjaði.

Tvey bein stungu seg útundan tí hvíta løriftinum, sum fevndi um alla pallmyndina. Fýra kassar og eitt radio stóðu á hvíta dúkinum. Alt hvítt, og gav tað áskoðaranum eina kenslu av, at vit vóru á grønlendskum ísi. Hesar leggir - og svenskan, nostalgiskan radiomusikk einastaðni úr 60-70unum (sungnan av Lill Lindfors), ið fylti rúmið - skuldi áskoðarin fyrihalda seg til longu frammanundan, at leikurin á hvítu grundini (soleiðis av álvara) var byrjaður.

Hetta við beinunum var bara byrjanin til eina framførslu har absurditetur var ein afturvendandi lutur, og áskoðarin var ferð eftir ferð tikin av bóli. Tað sum er vanligt og væntað var vent á høvdið. T.d. var samskiftið millum tær fýra ungu kvinnurnar heldur merkverdugt. Tríggjar